


**RÁFISKAPRÍSÁSETANIN**

Tá funnist hevur verið at arbeiði ráfiskanevndarinnar og neyðugt hevur verið at fingið straffireglur, og nú verður neyðugt at fáa gjørt formansvalið í nevndini til borgarligt umboð, so kann ein og hvør skilja ella siga sær sjálvum, at okkurt hevur verið og er galið í nevndarinnar arbeiði, men hvat tað er, eru tað tíverri so fá, sum hava fingið fatur í, tí við hesum sum við so mongum øðrum, sum skal koma almenninginum fyri oyra, verður heldur tagt enn sagt nakað um.

Sum annað av umboðum útróðrarmanna skal eg beinanvegin siga, at vit hava altíð skilt okkara tøgnskyldu í nevndini soleiðis, at tað galt øll viðurskifti í nevndini, og hava vit eisini fylgt hesi mannagongd alla ta tíð, sum vit hava arbeitt saman, men nú sýnist mær, sum at henda tøgnskylda ikki kann vera tann sama, og tað er uppá hægstu tíð, at fyrst og fremst okkara útróðrafólk og síðani alt Føroya fólk fær at vita, hvussu galið tað er innanfyri nevndarinnar gátt, tí soleiðis sum henda tøgnskylda hevur verið, hevur hon einans havt tann týdning, at ikki má sigast frá, hvussu gal in viðurskiftini hava verið og eru, og bert fyri at káva útyvir, at nevndin ikki fær teir upplýsningar, sum henni tørvar, fyri at áseta rættvísan útróðrarpris.

Nøkur heilt fá dømi:

1) Formaðurin í Búskaparráðnum verður biðin um at lata nevndini tað tilfar, sum hann hevur lagt til grund fyri rakstrarútreiðslum virkisins, hvussu hann er komin til útrøku %, hvussu nógv tonsatal er lagt til grund fyri dækningsbidragnum, og hvørjum virkjum gingið er út frá.
2) Formaður ráfiskanevndarinnar verður biðin um at lata nevndini útrokningartilfar sítt, ið hann legði til grund fyri ásetanini av ráfiskaprísinum í desember 1967.
3) Fiskasølan verður biðin um at lata nevndini søluavtalur og sølufakturakopiir.
4) Prísásetingin í august 1968 verður sett eftir ongum útrokningum og ongum skjølum.
5) Fiskasølan verður biðin um at lata nevndini søluavtaluna av upsa at vita.
6) Prísásetingin í desember 1968 verður sett eftir ongum útrokningum og ongum skjølum, hóast at tað fyriliggur telexskjal, ið sigur, at prísurin fyri hýsublokkar á kg er um kr. 4,80 og fyri smápakningar á 2.265 kg er kr. 6,80, og at hýsa er mangulvara, og prísurin má roknast at halda sær.

Her havi eg tikið seks dømi fram, og hóast alt okkara arbeiði fyri at fáa skil í ráfiskaprísásetingini, so tað arbeiði, sum vit eru settir at gera, verður ruddiligt, so hevur alt okkara strev hesari søk viðvíkjandi verið tíl onga nyttu, tí eingin av teimum monnum, sum hava havt ábyrgdina av hesum málum, hevur við einum orði latið við seg koma hesum málum til avkláringar.

Tá nú málið um at gera formansvalið til borgaraskyldu er fyrilagt løgtinginum, er tað ikki av vegnum, at sagt verður, at løgtingið má taka støðu eisini til tað tilfar og upplýsningar, sum nevndin skal arbeiða við, tí soleiðis sum vit umboð útróðrarmanna hava roynt hin partin í ráfiskamálinum, siggja vit ongan útveg at fáa tey neyðugu skjølini fram, og tá vit eru í minniluta í nevndini, og landsstýrið ikki nýtir tey rættindi, sum løgtingið hevur givið við straffireglum, eru vit prísgivnir at finna okkum í at vera hildnir uttanfyri alla ásetan á regluligum grundarlagi. Tí má sláast fast, hvør tað er, sum skal fremja tey tiltøk, sum neyðug verða, fyri at friður kann verða.

Tað hevði verið ein stórur lætti, um nevndin fekk sínar upplýsingar um landsstýrið, og skuldi tað heldur ikki verið av vegnum, at landsstýrið fylgdi eitt sindur við, hvussu prísviðurskiftini vóru á okkara útflutningi, serliga tá tað eru so nógvir, sum fáast við at selja fisk. Tí eyðvitað er, at tað sum serliga fær meg at skriva hetta er, at tað hevði havt ein ógvuliga stóran týdning fyri heimaútróðurin, um hann fekk at vita til dømis 14. hvønn dag, hvussu prísviðurskiftini vóru úti á marknaðinum, soleiðis at hann kundi lagt sín fiskiskap eftir, hvussu prísviðurskiftini vóru, og ikki sum nú, har hann ongantíð følir seg tryggan, tí sum er, er alt dult bæði fyri tí fiskimanni, ið prísurin viðvíkur, og síðan fyri øllum Føroya fólki. Grønland og Føroyar munu vera eindømi sum lond, har slíkt letur seg bjóða.

Til allarseinast vil eg siga, at tað sær fyri okkum og øllum útróðrarmonnum ógvuliga løgið út, at partur í einum máli, har straffireglar eru settar, fastheldur, at prísurin er lágur, og at skjølini, hann skal stýðja seg til, so ikki tola dagsins ljós.

Einaferð enn, rætti feilin, har hann er at finna.

*Daniel Jacob Jensen.*

* * *

Orsakað av aftursvari tygara sum viðmerkingar til greinina, ið eg skrivaði undir navni av »prisojavni«, skal eg einaferð enn gera vart við, at tað, sum eg rættleiddi tygum við var ikki hetta um vørurnar skuldu vera prísmerktar inni í handlinum ella í sýnisglugga, men hetta, sum tygum skrivaðu í leiðara grein tygara, nevniliga:

»*Sambært lógina skulu allar vørur í sýnisglugga vera prísmerktar*« ...

soleiðis stóð í grein tygara, og hetta er so framvegis antin skeivt skriva ella skeivt skilt.

# Spanska klippfiskaframleiðsla 75.000 tons

**TAÐ ER Í LØTUNI ÓGJØRLIGT AT SELJA FØROYSKAN FISK TIL SPANIU. UMFRAMT INNFLUTNINGSBANNIÐ HAVA SPANIÓLAR HÆKKAÐ INNFLUTNINGSTOLLIN VIÐ 10 PST.**

Spanski fiskiveiðuflotin veksur í stórum og verður útbygdur við nútímans førum.

Spanska klippfiskaframleiðslan er nú komin upp í 75.000 tons. Tað er 20 pst. meira enn bara fyri tveimum árum síðan.

Forbrúkið av klippfiski í Spaniu liggur um 35—40.000 tons árliga. Uppi í hesi nøgd eru 16—10.000 tons av innfluttum fiski, so teir hava reiðiliga nógv til avlops.

Spaniólar selja nógv av klippfiski til Portugal, Brasilia og Kongo.

Eisini teir hava verið raktir av portugisiska innflutningsbanninum og hava mótmælt hvassliga hesi diskriminering av spanskum klippfiski.

Sjálvandi hava allir handilsmenn frítt at merkja allar vørur í sýnisglugga um hettar líkar teimum, og fleiri gera tað, men beinleiðis skyldu til hetta sambært lóg hava teir ikki.

Orsøkin til, at eg tók til orða um hesa missskiljing var tann, at eg helt tað vera skeivt at leggja allar handilsmenn undir at bróta reglur, sum teir ikki hava skyldu til.

Hitt, at tað ikki eru allir, sum veruliga halda tað skyldu sum teir hava viðv. prísmerking, er so ein onnur sak — tað kemur so inn undir eftirlit og møguliga sekt — men tað broytir einki viðv. mistak tygara um at lýsa *allar vørur* undir hesa skyldu.

*Ch. Bærentsen.*
prísansari.

*Viðm.:*

Okkum vitandi varð samtykt gjørd í prísráðnum um, at *allar vørur sum liggja í sýnisglugga skulu vera prísmerktar.* Tygum hava síðani sett uppskot fram um — av praktiskum orsøkum — at broyta tað til til tað reglu sum er galdandi í dag.

Tað ber sjálvandi væl til at »hanga« seg í orðið *sambært lógina,* sum skrivað var her í blaðnum. Ein lóg skal haldast, og tað má ein samtykt í prísráðnum eisini vera gjørd fyri.

Tygum skriva, at orsøkin til rættleiðing tygara, var ikki hetta um vørurnar skuldu vera prísmerktar inni í handlinum ella í sýnisglugga. Tað er væl møgu ligt. Orsøkin til, at júst hetta varð tikið við í okkara seinastu viðmerking var, at tað tygum skrivaðu í rættleiðingini var eftir okkara hugsan, ikki var tað sama sum stóð í teirri av prísráðnum samtyktu reglu.

Tað er frálíkt at tygum í seinasta penni av greinini ivast í um allir handilsmenn halda seg til hesa reglu — tað kemur so inn undir eftirlit og møguliga sekt. Hví *møguliga* sekt tá tað greitt stendur í regluni: Brot móti hesum reglum koma sambært prislóg dags. 24.4. 1952 undir sekt, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

*Blaðstj.*

*Livilíkindini í Spaniu eru støðugt batnandi, og meina menn, at hetta kann koma at hava ta ávirkan, at meira verður keypt av klippfiski, sum er dýr vøra har á landi.*

*Hákun mælskur mælir,*
*tá menn hans gerast bleikir:*
*minnist til, mínir menn,*
*í longum talvi eru mangir leikir!*

* * *

**Hanna:** Tú, maður tín letur til at hava sjáldsamar gávur.
**Sanna:** Ja, tað kann sigast. Eg havi onga gávu fingið frá honum í fimm ár.

* * *

**Ein finur máti at klanka seg uppá er at sláa dagurðan og náttarðan saman og so leypa bæði um!**


## Skrivstovufólk

fær pláss á skrivstovu Føroya Fiskimannafelags, straks ella seinni.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum at senda innan 1. mars til

FØROYA FISKIMANNAFELAG
Tórshavn


## Útróðrastudningurin

eftir løgtingslóg nr. 1 dagf. 31.1.-1969 er frá 31.1-1969


*25 oyr. pr. kg. fyri ráoljubátar og*
*30 oyr. pr. kg. fyri bensinbátar*

sbrt. útrokning frá ráfiskanevndini dagf. 3.2.-1969.

*Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna*

# ROYNIÐ TYKKUM NÚ


Finn nøvn fyri myndirnar, tak fyrsta bókstav burtur úr, set rætt saman, og tú finnur navnið á stytri tíðarskeiði.



## 5 spurningar

1) Hvør grundaði Keypmannahavnar universitet?
2) Hvør landsmaður var Adolf Hitler?
3) Hvønn dag byrjaði seinra verðinskriggj?
4) Hvør heimspartur er næstminstur?
5) Hvør á í heiminum er vatnríkast?


**FÝRAKANTURIN**




1 lóður
2 bjarga fugli
3 fyri bakka
4 anda

LOYNDARORÐ


Finnið røttu orðini niðureftir. Á 2. og 4. reglu tvørturum fært tú tvinni sløg av fruktum.



1) steikja 2) brennievni 3) kortið 4) tapa 5) prát 6) til drekka tt.



*Yvir:* 1) brýnir 6) mansnavn 7) sót 9) skipastavir 10) skuld 12) fuglur 14) stykkjamál 16) tóni 17) plagg 19) spunalag.
*Niður:* 1) ómóður 2) ravmagn 3) eplir 4) ból 5) útlendingar 8) skal 11) ríkiligt 13) reim 15) á potti 18) bókstavarað.




*AT* eitt sirkus í Sidney heldur seg eiga hina fruktbarastu leyvinnuna, ið nakrantíð hevur livað í fangaskapi. Nýliga legði hon fýra ungar, og frammanundan hevði hon átt 76 ungar.

*Svar:* 1) Kona Kristian I 2) eystursaltari 3) 1. sept. 1939 4) Europa 5) Amazonáin.